# Veruleikin ala Rakul Debes

Vælkomin! Ikki er tað nemt, stakkals tit. Eg haldi, at fyrsti skúladagur er forferdiligur: Mann kennir ongan, og veit onki um alt tað, sum øll hini vita alt um. Ja, fyrsti skúladagur er ræðuligur, og eg føli við tykkum. Men av øllum teimum forferduligu døgunum, sum tit hava upplivað, so ætli eg, at hetta skal blíva tann BESTI forferdiligi fyrsti skúladagurin nakrantíð! So Hjartaliga vælkomin☺

## Fólkaskúlalógin:

Í nýggju fólkaskúlalógini stendur eitt ella annað um, at arbeiðast skal miðvíst fremímóti at fáa næmingin í sentrum, við m.a. at betra samskiftið millum skúla og heim. Men slappi bara av, tí soleiðis verður tað slets ikki her, so tit behøvast ikki longur at vera bangin fyri, at onkur lærari skal koma heim til tykkum at snakka við foreldrini, um tit hava gjørt fortreð ella okkurt. Tí her eru tit ikki næmingar, her eru tit Lesandi ☺ Og sum tit nokk vita, so er munurin ímillum hesi bæði, nógv størri enn bara tað, at orðini byrja við hvør sínum bókstavi. Men fyri eina sikkerheits-skyld, so fari eg nú at fortelja eina søgu, sum lýsir munin á hesum báðum orðunum, soleiðis at tit vita AKKURÁT hvat tað er, sum tit ganga inn í. Ella hvat tað er, sum tit eru á veg út úr, so lurti nú væl.

## Søgan:

Einaferð vóru tað tveir kyllingar: Kúlli, sum vaks upp á einum gomlum bóndagarði, saman við mammu síni og øllum hinum hønunum, og so DX32, sum vaks upp á einum statskontrolleraðum laboratorium saman við nógvum øðrum javnaldrum. Sjálvt um báðir vóru kyllingar, so vóru teir sum dagur og nátt: Kúlli var altíð glaður úti og spældi við hinar kyllingarnar í bóndagarðinum, meðan Dx32 apatiskt sat inni í búrinum hjá sær og kúrdi allan dagin, og so lýsti hann eisini í myrkri, tí hann var nemliga eitt produkt av einari samantvinnan av geiðslavirknum kraftfóðri og einari tíðarinnstillaðari klekimaskinu, sum koyrdi uppá radio-aktivt burturkast av tí ringasta slagnum. Tá ið Kúlli var svangur, fór hann inn í tað gamla, hyggiliga høsnarhúsið, har maturin stóð klárur, og tá ið hann so var mettur, rann hann út aftur í garðin at spæla víðari. Í laboratori'inum var annað skil, tí óansæð um Dx32 var

svangur ella ei, so bleiv matur stappaður niður í hann fimm ferðir um dagin, inntil hann var so mettur, at hann mundi mist pippið.

## Søgan greinað og tulkað:

Hatta var so søgan. Um vit nú fara at greina og tulka hana, so er Dx32 næmingurin, sum í 13 ár hevur gingið runt inni í laboratori'inum, sum symboliserar fólka- og miðnámsskúlan, har ein slanga verður trýst niður í hálsin, og ein Væl-Vigað pensum máltíð verður stappað niður í kyllingin, óansæð um hann er svangur ella ei.

Føroya Læraraskúli, undir Fróðskaparsetur Føroya, minnir meiri um bóndagarðin, sum er eitt fríøki, har leysgangandi kyllingurin hevur fría atgongd til alt tað, sum hann hevur brúk fyri, men har hann sjálvur noyðist at pikka Gull-kornini upp. Hetta ger hann til ein sterkan, sjálvstøðugan, sunnan kylling.

Ná, men sakin er: Vit eru øll eks-búrhønir. Vit hava verið tvungin at ganga runt í statskontrolleraða laboratori'inum, og halda tí tað vera púra normalt og sjálvsagt, at aftaná at ein skúlaklokka hevur ringt (Pavlov), so setur mann seg á SÍN pinn at bíða eftir mentalum kraftfóðri, sum púra automatiskt verður pumpað niður í passiva móttakandi næmingin í 45 minutters portiónum. Okey, okey, kanska var tað neyðugt. Kanska er fólkaskúlin, sum tá ið mann plantar eitt lítið træ, og verjir tað við at seta nakrar pinnar rundanum, sum mann so bindur træið fast í, so tað fær frið at vaksa og festa røtur. Men so kemur dagurin, tá ið bondini skulu kappast. Tann dagurin er tann ringasti, ella tann besti. Tað er tann fyrsti dagurin í restini av lívinum, og tað er í dag: Fyrsta skúladag á Føroya Læraraskúla. Frá nú av mugu tit sjálvi finna gullkornini. So minnist bara til hetta, tá ið tit <u>fara</u> at blíva frustreraði yvir, hví ongin slanga serverar nakað automatiskt longur: Nú eru tit Lesandi.

## Niðurgerðing av pedagogum:

Ná, men anyway, nú sita tit so her, í Pedagogskúlanum. Næstu nógvu dagarnar fara tit at hoyra setningar sum: "Ert TÚ farin á pedagogskúlan?" og "Ert tú farin á pedaGOGskúlan???" Eg plagi bara at svara suffandi: "Ja, handan vegin skulu vit øll!" Tað eru also enn nøkur, sum himla, tá ið tey hoyra um pedagogar. Serliga menn. Eg haldi at pedagogfakið, sum FAKfelagsligt fakFELAGsligt FAK fekk eitt keðiligt rykti av tí óhappi, at fakfelagið ordiliga tók seg upp umleið samstundis sum kvinnufrígerðingin í 70'unum, har vaksnar konur brendu brystholdarar og vildu sleppa at læra til  okkurt. Menninir blivu sjálvandi ótryggir, tí drekkamunnurin á sofuni hvarv, sohvørt sum konurnar lósu bøkur, og akkurát sum mann gjørdi við ta klóku konuna í miðøldini, har mann setti eina pirru á nøsina og kallaði hana fyri

eina heks, so royndu fleiri eisini at niðurgerða pedagogar. Pápi mín segði t.d. “ Skal tað nú vera neyðugt at LÆRA hvussu mann passar børn? Mamma tín kláraði tað uttan nakað!” Ja, svaraði eg: “Sjálvandi skal mann læra tað, tá ið tað eru børnini hjá ØÐRUM fólkum mann skal passa.” Og sjálvandi skal mann læra tað. Tað er nógv tað mest etiskt forsvarliga, tí vit fara at vera advokatar hjá børnunum, betalt av foreldrum, sum til eina og hvørja tíð hava krav uppá, at vit, um ikki annað, so altíð kunnu svara spurningum sum: “Hví er Jógvan vátur um bein?” Tá er gott at kunna svara: “Sambært Rousseau hava vit sokratiskt valt at íðka Piaget og Montessori í Føroyskt vikuni, og tá ið so sílið beit á tráðuna, fylgdi lítli Jógvan beinanvegin Newton’sa fyrstu lov og datt í ánna!” Hetta er eitt super svar, sum gevur Jógvan nøkur stolt foreldur ☺ So Ja, tað ER neyðugt at LÆRA tað!!!

## Tann lesandi vs. grillkyllingurin við ókappaðum nalvastrongi:

Men útbúgvingin merkir fyri tykkum, at tit, tey næstu 4 árini hava ein einastandandi møguleika at læra tykkum sjálvi tað, sum tit sjálvi fara at læra tykkum. Also: Ein góður sirkul. Í mun til grillkyllingin í fólkaskúlanum, so hava tit nú bæði tíð og rúm at vaksa og mennast, tí innanfyri hesar veggirnar, sum eru karmurin, finst øll relevant vitan. Tvs. at tit nú, óansæð kyn, aldur og frisyri, lættliga kunnu hoppa yvir á “nærmeste pædagogiske udviklingszone”, við annaðhvørt at útvikla tykkum í bólki, sum einstaklingar, við at erfara, lesa, lurta og øgiliga vigtigt, við at spyrja. Tí at tey, sum arbeiða her, eru tey, sum einaferð sótu har, sum tit sita beint nú, og tí vita tey hvar tit eru, og tí hava tey eisini svarið til næstan óansæð hvønn spurning tit fara at spyrja. So spyr endiliga.

Tað mótsatta, grillkyllingurin við ókappaðum nalvastrongi, situr og grenjar, tá ið ongin fólkaskúlalærari kemur og pumpar fóður niður í hann, uttan at hann, so mikið sum noyðist at gera tað allarminsta sjálvur. Tær typurnar finnast eisini her á Læraraskúlanum, uha, tíverri sigi eg bara. Vanliga kennast tær aftur við at sita í einum króki, og teska við bubligum í munninum, og smsa og himla við eygunum, suffa og puffa og grenja yvir ALT og ONKI: Manglandi initiativ frá starvsfólkunum, vánalig kor, keðiligt tilfar osfr osfr. Eg vil geva tykkum tvey góð ráð, um tit vilja koma væl ígjøgnum hesa útbúgvingina:

1. IKKI grenja!
2. IKKI geva energi til grenjisurrurnar!

Smílist heldur yvirberandi til tær og verið tit nøgd. Bestemmi tykkum fyri at vera nøgd.

# Fyrsta boð:

Annars gangi eg í 2.P. Tað er ein klassi við nógvum lesandi í.  Tað er har eg gangi: Í einum klassa við øðrum lesandi, og tey sum ganga har, ganga í einum klassa við øðrum, t.d. við mær. Ein genta í klassanum hevði hetta við ofta ikki at vera í skúla. Eg veit ikki hvussu tað eitur her, men í fólkaskúlanum kallaði mann tað fyri at skulka. Hon forsvav seg ofta, gloymdi hvat fyri dagur tað var, mátti ørindir, tíðliga heim og sovarið. Einaferð í fríkvarterinum segði eg við hana: "Túwe, eg gangi í klassa saman við tær..." "Øhhh, ja?" segði hon eitt sindur 'hvar vilt tú hen við hasum'. "Og so mást tú eisini vera her, tí hvis tú ikki ert her, so fái eg ikki gingið í klassa saman við tær..." Eg segði tað eitt sindur harðliga. Eg veit ikki um tað var so ræðuliga gott sagt ella um hatta var serliga pedagogiskt, men tað hjálpti, og nú gongur hon glað her, og tí blíva bæði eg OG hon til betri pedagogar ☺ Poengið er: Tað er mega vigtigt at møta upp her. Tit eru tey sum sluppu ígjøgnum nálareygað. Tit eru tey sum sluppu inn á hendan skúlan, og tí mugu tit møta upp til teir fyrilestrarnar sum eru, bæði fyri tykkum sjálvi OG hini, tí um øll forsova seg og gera ørindir, hvønn dag í 4 ár, so heldur hetta uppat, og so er ongin klassi longur. So fyrsta boð: Møti upp!!!

# Facebook, Youtube osfr.:

Men er tað so nokk? Bara at møta upp? Sjálvandi ikki, men tað er í hvørfall eitt krav mann má seta sær sjálvum sum útgangspunkt. Eg siti altíð fremst. Til allar fyrilestrarnar møti eg tíðliga, so eg sleppi at sita fremst. Og har siti eg so og lurti og taki notatir og sovarið. Einaferð, av onkrari keðiligari grund, var eg komin at forrokna meg, og tí mátti eg, mitt í einum fyrilestri, fara út á wc. Fyri meg var tað ergreligt, og eg veit enn ikki, og fari ongantíð at vita, hvat bleiv sagt, teir 3 minuttirnar eg ikki var til fyrilestur. Men tá ið eg so kom inn aftur í auluna, ígjøgnum hasa hurðina har, og gekk framm eftir miðgongini her og setti meg har, uppdagaði eg nakað, sum sjokkeraði meg: Næstan øll hava farteldur við, men fleiri av teimum, sum sótu her, sótu á Facebook, Youtube og onkur, sum ikki hevði internet-samband legði eina gammeldags 7-kabal. Eg meini tað: Eg var sjokkerað! Tí hetta eru  fríttgangandi hønirnar, sum sjálvar mugu pikka gullkornini upp. Kann mann so tilláta sær at lata dýrabæra vitan fara aftur við borðinum uppá handan mátan? Eg minnist enn tann fyrilesturin: Tær tvær skapanarsøgurnar í skapanarsøguni. Mega interessant!!! Men eg ivist í, um nakar av hinum minnist hvønn tey chattaðu við ella hvat tey chattaðu um: "Hey gert?" "Onki, tú?" "Onki" "Kuul" "Sakin" Lol".

Útbúgvingin er ein prosess, har sum vitan leggur grund fyri, hvat onnur vitan verður bygd á. Og um tað sum mann lærir í fyrsta klassa her, er for høgt flúgvandi fyri fyrstaársnæmingin, so burdi mann fari aftur í fólkaskúlan og kravt pengarnar aftur. Tí minst til hetta: Ongin útbúgving í heiminum er designað til IKKI at klára. Sjálvt astronout útbúgvingin, har mann lærir at stýra einari rakett upp á mánan og niðuraftur, er designað til tann lesandi AT KLÁRA. Alt annað hevði verið for býtt. So eitt gott ráð: Møt upp, fylg við og elska at ganga her, tí um 4 ár, tá sleppa tit ikki at ganga her meir, og skulu kanska ongantíð aftur ganga her...

## Tann stóra blandimaskinan innast á gongini:

Men til nakað heilt annað, so er tað so, at av onkrari grund er tað mesta av tilfarinum, sum tit fara at fáa, komið úr tí stóru kopieringsmaskinuni innast á gongini. Hon kann kopiera fleiri 1000 síður um tíman, og hvis mann so leggur øll kopiini saman, so røkka tey fýra ferðir rundan um jørðina. Uppá ein máta er tað gott at vit fáa hesi kopiini næstan gratis, men uppá ta aðru síðuna, so ivist eg í, um eg hevði keypt bøkur, sum røkka rundan um jørðina, um eg sjálv skuldi prioritera, men tað skal eg ikki, og nú kemur tað snediga: Eg snakkaði einaferð við ein mann, sum livdi av at spæla poker í Vegas. Tað er forrestin hann, sum hevur skrivað hasa bókina "Teir 8000 mátarnir at blanda kort uppá." Og hann pástendur, at tað finst ein 'øvre fysisk grensa' fyri hvussu nógvar mátar mann KANN blanda so og so nógv pappír uppá. Og hann bleiv púra paff, tá ið eg fortaldi honum um kompendi'ini, sum vit fáa útleveraði her, direkta frá tí stóru kopimaskinuni... Ella blandimaskinuni☺ Tað er faktisk heilt interessant, hvussu handan maskinan kann blanda tingini: Síða 8 og 14 eru prentaðar niðast á síðu 73, og síða 17 og 18 mangla, fyri síðani at dukka speglvent upp á síðu 100 sum fótnotir osv. Interessant haldi eg. Óinteressant helt eg fyrr. Ja, eg helt faktisk tað vera so keðiligt at eg bara ætlaði at gevast. Eg skal ikki siga at eg græt meg í svøvn... Ella jú, lat meg bara siga tað, fyri at undirstrika mítt poeng: Eg græt meg í svøvn. Men so tók eg ein drekkamunn og eitt ringbind og setti meg at sortera við køksborðið. Lítlibeiggin hjá mær sá hetta, og helt at tað sá so stuttligt út, so nú tjenar hann heilt fitt eyka við at sortera kompendi'ir fyri meg, og vit eru bæði glað: Hann fær løn og eg fái frið. Poengið er: Tað er stoff til menning í einihvørjari situatión, og líka so sikkurt sum at allir vegir føra til Rom, so føra akkurát somu vegir eisini FRÁ Rom. Tað er bara upp til TÍN hvønn veg tú velir at ganga vegin☺

## Tað stutta av tí langa:

Hatta var so tað, sum eg vildi siga. Sjálvandi kundi eg sagt tað nógv longri, og við nógv meiri orðum, men tað forandrar ikki tað, sum eg vil siga: Gang her og fá eina góða útbúgving. Fá tað pappírið, sum kann liggja til grund fyri øllum tí, sum tit fara at gera víðari í lívinum, samstundis sum tit mennast og koma at kenna tykkum sjálvi og hini og hvønn annan og alt og øll. Gang her, við fyrst og fremst at møta væl upp. Sit fremst. Lurta, tak notatir, diskuttera, verð óeinig við hini í fríkvarterinum. Verð ímóti tí, sum tú segði beint íáni og grundgev við anerkendum teoretikarum. Elska at gang her. Tað geri eg. Takk fyri! ☺

Rakul F. Debes

18. august 2009